# LÆRARASTARV Í SERNÁMSDEPLINUM

Í Sernámsdeplinum er eitt lærarastarv (møguliga 2) leyst at søkja til setanar **1. august 2003.**

Starvið er fulltíðarstarv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava
- Fólkaskúlalæraraútbúgving
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt og við hugflogi eftir støðu næminga

Umsøkjari má vilja útinna serskúlaarbeiði í víðastu merking. Eisini má hann vera hugaður at menna stovnsins og sín egna førleika við at luttaka í skeiðum í samráð við leiðslu depilsins.

Í sambandi við møguligar skipanarbroytingar má umsøkjari góðtaka, at umskipan av starvinum kann koma uppá tal.

Læraralesandi, ið taka prógv í summar, kunnu eisini søkja.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum, Fólkaskúladeildini, við starvsstaði í fólkaskúlanum og við fyribils tænastu í Sernámsdeplinum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Starvið verður sett sum sáttmálasett starv uttan so, at tann, sum sett/settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið liggur á heimasíðuni www.mmr.fo, skal verða send **Sernámsdeplinum, á Frælsinum 32, postrúm 2036, FO 165 Argir,** skjótast til ber og so leiðis, at hon er Sernámsdeplinum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 29. apríl 2003.** Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av prógvbrævi og møguligum viðmælum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Hans Eli Dahl, stjóra.

*Tórshavn, 9. apríl 2003*

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 - Postrúm 2036 - FO 165 Argir
Telefon 314522 - Fax 310196 - e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

# Talilærari

Vit sóknast eftir talilærara til tali-/ málmennandi arbeiði við børnum undir skúlaaldur í Tórshavn. Tann, ið settur verður, fer at samstarva neyvt við royndan talilærara, stovnsleiðarar/- pedagogar og við fakfólk í Sernámsdeplinum.

**Tíðarskeið:** Frá 1. august 2003 til 30. juni 2004.

**Tímatal:** 14 tímar um vikuna

**Førleikakrøv:**
- Fólkaskúlalærari-/pedagogur við talilæraraútbúgving.
  *Audiologopedur við øðrari grundútbúgving og við verkligum royndum við smábørnum er eisini skikkaður.*
- Førleika til bæði sjálvstøðugt arbeiði og til neyvt samstarv við fakbólkar og foreldur.
- Vera hugaður at menna egnan og depilsins førleika á økinum.
- Í samb. v. møguligar bygnaðarbroytingar góðtaka tillagingar eftir hesum.

**Lønartreytir:**
Eftir sáttmála ímillum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið ella sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn** við avriti av prósvkjølum og møguligum viðmælum skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi 29. apríl 2003.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Egon Hansen, tali-hoyriráðgeva ella Hans Eli Dahl, stjóra – Sernámsdepilin tlf. 314522.

*Tórshavn 9. apríl 2003*

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 – Postrúm 2036 – FO 165 Argir
Telefon 314522 – Fax 310196 – e-postur: sernamsdepilin@snd.fo

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

# Kunngerð um summarferiu 2003

Byggivinnan heldur summarferiu vikurnar 30, 31 og 32, tað er frá mánadegi 21. juli til leygardagin 9. august.

**Vinnuhúsið**
***og fyritøkurnar:***

| | |
|---|---|
| P/F Articon | P/F Zacharias Leitisstein |
| P/F BSV | P/F Atlanticpane |
| Sp/f Búsetur | P/F Byggitek |
| P/F Demich | P/F Einar Mikkelsen |
| P/F Elmek | P/F Føroya Gluggi |
| Sp/f El & Tele | P/F Guttesen & Staksberg |
| P/F Føroya Termovirki | Sp/f Hans Dam |
| Sp/f Haldur Vang | P/F J & K Petersen |
| J & K Betong | P/F LM – Electric |
| Klaksvíkar Byggivirki | P/F Vatnsoyra Snikkaravirki |
| P/F Løvubetong | |

**Vinnuhúsið • Boks 1038 • R. C. Effersøesgøta 30 • FO-110 Tórshavn**
**Tlf. +298 31 18 64 • Fax +298 31 72 78 • E-mail: industry@industry.fo**

# Norðoya Røktarheim
**Klaksvík**

Søkt verður eftir summarfrítíðaravloysarum til heimið frá 01. juni til 30. september 2003. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisation verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, F0-700 Klaksvík.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Umsóknarfreist: 24. apríl 2003.

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Skúrar til sølu

Við hesum verða arbeiðsskúrarnir hjá Landsverkfrøðinginum - við brúna til Vágatunnilin, Leynamegin - lýstir til sølu.

Talan er um níggju skúrar, 2x7 m, sum eru settir saman til skrivstovu- og fundarhøli hjá NCC.

Skúrarnir, sum væntandi verða tiknir niður beint eftir páskir, kunnu til tá síggjast á staðnum í Leynum.

Avheinting av skúrunum, verður eftir nærri avtalu við Landsverkfrøðingin.

Boð skulu verða Landsverkfrøðinginum í hendi seinast 23. apríl 2003, kl. 1400.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Óla M. Petersen , deildarleiðara, tlf. 311333, teldupostur: oli@lv.fo

**FLAGGDAGSRENNING 2003**

Tilmelding til Flaggdagsrenningina tann 25. apríl kann gerast á heimasíðuni: www.athletics.fo og á Kunningarstovuni.

**BRAGDIÐ**

Sosialurin 311820

**IRAK HJÁLPIN**

**Giro 77011**
**ella konto hjá okkum í peningastovnunum**

**REYÐI KROSSUR FØROYA**

<ph_1> <ph_1> <ph_1> <ph_1>



# Blákrossheimið
**Søkir eftir sjúkrarøktarfrøðingi**

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi til Blákrossheimið at byrja skjótast gjørligt.

Talan er um eitt avloysarastarv, 0,8 tíð í skiftandi vaktum fram til 30.09.03.

**Starvið umfatar**
Sjúkrarøktarligu uppgávurnar í samband við avrúsan og viðgerð á heiminum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt at starvinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn- og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Almanna- og heilsumálaráðið og Sjúkrarøktarfrøðingafelag Føroya.

Nærri fæst at vita starvinum viðvíkjandi á tlf. 315575 frá Olgu Magnussen, leiðara.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12
100 Tórshavn
Tlf. 315575
Fax: 315567
E-mail: blakross@blakross.fo

Blákrossheimið, ið er eitt viðgerðarheim fyri rúsevnismisnýtarar, er stovnsett av Bláa Krossi Føroya við góðkenning frá Føroya Landsstýri. Á heiminum eru 11,5 starvsfólk. Pláss er fyri 15 búfólkum. Eisini eru búfelagsskapir og eftirviðgerð knýtt at heiminum. Blákrossheimið verður fíggjað við árligari játtan frá landsstýrinum.
Blái Krossur Føroya er ein kristiligur hjálparfelagsskapur, sum hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa støødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja misnýtslu av rúsdrekka og øðrum rúsandi evnum, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi, at boða gleðiboðskapin um Guds kærleika til menniskju.

# PÁSKASTEVNAN 2003

**í Ítróttarhøllini á Skála**
**í døgunum 17. til 21. apríl**



**TALARAR:**
Enevald Flåten, Pauli Høj
Erik & Hilde Bedsvaag

**LOVSANGUR, SANGUR og VITNISBURÐUR FRÁ m.a.:**
Tummas Jacobsen, Theodor Petersen, Heina Lützen



**Loud ungdómskvøld við drama, dansibólki, Bracqet**
**"Syng við" kvøld fyri alla familjuna**
**Forbøn og felagsskapur**

## SKRÁ FYRI PÁSKASTEVUNA 2003
Ímillum morgunmøtini er ein steðgur
uppá 15 min. har kaffi er at fáa

### Skírisdagur
Døgurði verður í Kelduni
**Kvøldmøti kl. 18.00**
Stevnusetan
Lovsangur: Keldan
Sangur: Hilde B
Tala: Erik J. Bedsvaag

### Langi fríggjadagur
**Morgunmøti**
**Kl. 10.30**
v/ Erik J. Bedsvaag
Sangur: ung úr Hoyvík
**Kl. 12.00**
v/ Paula Høj
Døgurði verður í Kelduni
**Kvøldmøti kl. 18.00**
Lovsangur: Keldan
Sangur: Tummas Jacobsen
Tala: Enevald Flåten
**LOUD kl. 22.00**

### Leygardagur
Døgurði verður í Kelduni
**Kvøldmøti kl. 18.00**
Lovsangur: Keldan
Sangur: Heini Lützen
Tala: Erik J. Bedsvaag
**"Syng við" kl. 21.30**

### Páskadagur
**Morgunmøti**
**Kl. 10.30**
v/ Enevald Flåten
Sangur: Systrarnar í Evngeliuhúsinum
**Kl. 12.00**
v/ Erik J. Bedsvaag
Døgurði verður í Kelduni
**Kvøldmøti kl. 18.00**
Lovsangur: Keldan
Sangur: Hilde B.
Tala: Enevald Flåten
**LOUD kl. 22.00**

### 2 páskadagur
**Morgunmøti**
**Kl. 10.30**
v/ Erik J. Bedsvaag
**Kl. 12.00**
v/ Enevald Flåten
Døgurði verður í Kelduni
**Kvøldmøti kl. 17.00**
Lovsangur: Keldan
Sangur: Kristina/Heidi
Tala: Erik J. Bedsvaag

**KELDAN**

**Øll eru vælkomin á páskastevnuna**

# Skrivstovulærlingur

Vit sóknast eftir lærlingi innan fyrisiting til skrivstovu okkara.

**Umsøkjarin skal:**
- hava góð samstarvsevni
- hava teldukunnleika
- verða nærlagdur og rókin
- verða væl fyri í enskum máli
- verða skrivliga væl fyri á føroyskum

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen, stjóra. Tlf. 422503 ella t-post: gunnbjor@thor.fo.

Umsóknin saman við avritum av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til:

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. mai 2003.

***P/F THOR** er eitt felag, sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni og ymiskt annað virksemi í hesum sambandi. Víst verður til heimasíðu okkara: www.thor.fo.*

# Hús í Kvívík til sølu



Um hóskandi boð fæst, eru húsini »á Snið« í Kvívík til sølu. Húsini máta 9 x 7,1 m uttan og grundøkið er 324 fermetrar.

Húsini eru bygd í 30-unum, men eru høvuðsumvæld hesi seinastu 10 árini. Húsini eru klødd og isolerað, takið og vindeyguni eru skifti, baðirúm og køkurin eru nýggj.

Húsini eru í trimum hæddum. Kjallarin óinnrættaður. Á miðhæddini eru gongd , baðirúm, køkur og tvær stovur. Á loftinum eru 3 kømur.

Áhugað kunnu venda sær til:



**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 · Box 359 · FO–110 Tórshavn · Tlf. 311260 · Fax 311261
e-mail: advfelag@post.olivant.fo

| | |
|---|---|
| Tormóður Djurhuus, adv. | Jógvan Páll Lassen, adv. |
| Petur Even Djurhuus, adv. | Jógvan E. Ellefsen, adv. |
| Ingi Højgaard, adv | Anna Dam, adv. |